inni - trygt og ómaksleyst til hús www.inni.fo



Suður



Eystur



**Norðurlon**, nettovídd 69 m²

# Lutaíbúðir í Gøtu

**Lyklakláru arkitektteknaðu íbúðirnar verða í bygningunum hjá Tøting í Syðrugøtu.**



Vestur



Norður

**Handilsbygningur**
nettovídd 86 m², Terassa 12.5 m²



Stovuhædd 51 m²



Loftshædd 35 m²

**Vesturlon**



Loftshædd 10 m²



Stovuhædd 69 m²

## Fyrr og nú

Í mong ár hevur Tøting verið ein ímynd av Syðrugøtu, eins og Syðrugøta hevur verið ein ímynd av Tøting. Eftir at framleiðsluviðurskiftini eru broytt, er ikki brúk fyri øllum hølunum, og tí verður bygningurin brúktur til tað, sum munar og gagnar best í veðurgóða plássinum mitt í bygdini. Tøting heldur tó fram sum vanligt. Møguleikin at eiga og leiga er ikki eins nógv brúktur í Føroyum og aðrastaðni, men nú skal tað verða. Sjálvt um lutafelagslógin enn ikki er viðtikin, ber væl til við núverandi lóggávu at gera tað púra trygt fyri eigarar av lutafelagsíbúðum.

## Gamalt og nýtt – eiga og leiga

Spildurnýggju íbúðirnar vera gjørdar inni í bygningunum, og vera 9 í tali. Alt fast innbúgv er við, gólvini eru við hita og eru løgd við parkett. Øll hava egna inngongd, og eiga sín egna lut, ið tey ráða yvir, sum var tað ein eigaraíbúð. Talan er um lútaíbúðir, har keyparin keypir sín lut, sum hann so eigur, og rindar restina sum vanliga húsaleigu eftir leisti hjá Húsalánsgrunninum.

## Stílur og snið

Íbúðirnar verða væl innrættaðar av royndum arkitekti, har plássið verður útnyttað best møguligt, og eitt byggifelag ger arbeiðið við fyrsta floks handverki og tilfari. Samstundis, sum tær eru rúmligar og liviligar, verða tær ljósar og hugnaligar, og trivnaðurin verður settur í hásætið. Roynt verður at fáa hugnaliga umhvørvið uttanfyri inn í íbúðirnar. Nakrar av íbúðunum eru rørsluvinaligar í einari hædd.

## Uttanfyri og uttanum

Syðrugøta, sum seinnu árini hevur verið karmur um G-festivalin, er kend fyri fjálga, náttúruvakra og hugnaliga umhvørvið. Bygdin, sum liggur mitt í Eysturoy, liggur væl fyri ferðslu beint við landsvegin, men vegirnir í bygdini eru so at siga allir blindir. Tú kanst flyta teg runt í umhvørvinum uttan at verða nervaður av nógvari ferðslu. Stutt er oman á sandin, og bygdin er bæði barnavinalig og eldravinalig. At byrja við verður eitt sindur av framleiðslu, handli og gallarí v.m., men við ársenda verða tey hølini eisini gjørd til íbúðir, umframt eitt gott felagshølið til øll íbúðarfólkini at brúka, til dømis til føðingardagar, veitslur o.a.

## Snið, stødd og innrætting

**Íbúðirnar hava 3 ymiskar støddir:**

**Snið 1** er á 84 m². Har er: Inngongd, durur, stova / alrúm / køkur, hjúnarrúm, skápsgongd / baðirúm og kamar.

**Snið 2** er á 80 m². Har er inngongd, durur, gongd, baðirúm, stova / alrúm / køkur, hjúnarrúm við trappu upp til loftsrúm / stovu, kamar við trappu upp til loftsrúm / arbeiðsrúm.

**Snið 3** á 102 m² hava 2 hæddir. Í niðaru hædd er: Inngongd, durur, stova / alrúm / borðsstova / køkur við trappu upp til ovastu hædd og grovkøkur / bryggers. Í ovaru hædd er: Trappugongd við útgongd til útigólv / altan, hjúnarrúm, baðirúm og kamar.

## Fakta:

**Adressa:** ............... Júksnará 9, Syðrugøta
**Matr.nr.:**............... 179b
**Byggiár:** ............... 2009
**Hæddir:**................ 1, 1½ og 2
**Gólvvídd:** ............ 80m², 84m² og 102m²
**Grundøki:** ............ 752 m²
**Prísur:**................... Kostnaður fyri íbúðarlutin er kr. 250.000,00 ella 300.000,00 alt eftir stødd

inni

P/F Inni | Niels Finsens Gøta 37 | P.O. Boks 364 | FO-110 Tórshavn | inni@inni.fo | Tlf. 320 410 | Fax 320 510